Leikrit



# Jólarok

Landsmiðstøðin

# J Ó L A R O K .

Leikarar:

| | |
|---|---|
| Brynhild: | (mamman) |
| Símun: | (pápin) |
| Marin: | (omman) |
| Elin: | (dóttirin) |
| Jákup: | (sonurin) |
| Heri: | (grannin) |
| Lív: | (syskinabarn) |

Skrivað: Steinbjørn B. Jacobsen

(Marin, omman, situr einsamøll og bindur inni í stovuni ella køkinum).

Marin: Ja, ja, vælsignað. Tey smáu neyðardýrini skulu øll fáa nýtt upp á beinini til jóla (telur eyguni hart). Eg átti eitt bomm onkustaðni. Tað styrkir so væl, og mínum tonnum ger tað einki (flennir, meðan hon leitar kemur dóttirin, Brynhild, inn. Marin verður kløkk, men fær bommið í munnin).

Brynhild: (kemur inn við nógvum pakkum, er pøst) Sum eg eri móð. Nú skal eg sita pinnastill og njóta hesa plátuna, sum Símun skal hava í jólagávu.

Marin: Ja, ja eg veit ikki, men fyrr var nógv arbeitt. Fyrr vóru vit ikki so móð. Fyrr...

Brynhild: Ja, ja mamma, men fyrr er ikki nú.

Marin: Eyðverið tað, er fyrr ikki nú (tónleikur hoyrist) (Elin dóttir Brynhild kemur brestandi inn)

Elin: Eg skal hoyra hesa plátuna nú (tekur hina plátuna av)

Brynhild: Sum tú ert frek og framlig. Eg havi beint nú sett mær fyri at njóta hesa plátuna og hvíla meg eina løtu. (fer út) (Elin leggur sína plátu á, hon dansar og syngur á gólvinum. Omman hyggur at).

Marin: Sum tey villu í Afriku.

Elin: Nei, omma, hetta eru føroyingar.

Marin: Ja, ja eg meini tað. Fyrr er ikki nú.

Símun: (kemur inn) Hvar er blaðið (hyggur um seg og rópar) Hvar er blaðið?

Brynhild: Vælsignað Elin. Minka. Minka um hatta óljóðið.
Bara eitt lítið sindur.
Hví skal tað verða so hart? At alt grannalagið eisini skal hoyra tað?

Jákup: (Jákup kemur inn við einum tónabandi í hondini og gongulurti á høvdinum)
Skrúva niður fyri hasum lortinum.
Nú skal tú hoyra nakað, sum krimar. (setur bandið á útvarpið)

Marin: Nei, nei, tey eru blivin óð í høvdinum.
Tey eru øll í barndømi uttan eg (telur eyguni)

Jákup: (Hevur sett bandið í, harður tónleikur hoyrist)
Hetta er í ólagi pappa. - Eg hoyri einki.

Símun: (hyggur bilsin upp) (ristir við høvdinum)
(Nei, men hvussu ólukkan kanst tú hoyra nakað.
Gongur tú í ørviti, ella ert tú púra frá tær sjálvum.
(tekur gongulurtið av høvdinum á honum. Setur seg so aftur)

Jákup: (rópar til Elina)
Hetta er nógv feitari tónleikur enn hatta barnaskvaldrið hjá tær.

Elin: (dansar og rópar aftur) Eingin kann dansa eftir hasum fjasinum.

Símun: Halt gák.
Nú gloymdi eg útvarpið. (Springur upp. Skumpar Jákup burtur, gevur honum bandið)
Tak bandupptakaran í køkinum og far upp á kamarið hjá tær og lurta eftir hasum óljóðinum.

Jákup: Tað skal altíð verða eg, sum skal. Altíð eg. Tað er bara eg, sum skal lúta. (hann fer. Útvarpið ljóðar, meðan Símun lesur. Telefonin ringir. Elin Flennir)

Símun: Tak telefonina Elin.

Elin: Hví tekur tú hana ikki.
Eg skal altíð taka hana.

Símun: Tí tað er til tín ella beiggja tín.

Elin: So kann hann sjálvur taka hana.

Símun: Tak hana so for ólukkan, sigi eg.

Elin: Eg tók hana síðst, og tá var tað til Jákup. Tað var hasin freki, tómi lorturin Tom.

Brynhild: (Kemur brestandi inn) Hví tekur eingin telefonina?
Hallo, hvør er tað. Ja, bíðja. Jákup, Jákup. Telefon.
Tað er Tom.

Jákup: Eg havi ikki tíð nú. Eg skal ringja aftur.

Brynhild: Hann skal ringa aftur seinri. (fer)

Elin: Hvat segði eg. Eg visti tað. Eg visti tað altíð.

Brynhild: (Kemur inn aftur) Segði hann nakað um bingo. Eg helt meg hoyra okkurt.

Símun: Eg hoyrdi einki. Tað er sovorðin gangur, at tú hoyrir ikki, hvat tú sjálvur hugsar.

Marin: Jú vælsignað. Um eitt bingo hoyrdi eg íð hvussu so er. Tað var ein 9'indi flokkur, sum skuldi hava bingo í felagshúsinum hjá felagsskapinum MUB ella BUM. Einir ótrúligir felagsskapir við teimum mest óhugsandi nøvnum. FNUG. TUG, RUK (lær fyri seg sjálvan).
Men eingin eitur enn: RUMPI STUMP.

Jákup: (Kemur brestandi inn) Nú mundi eg gloymt Skansat. Tendrar sjónvarpið).

Elin: (Flýgur upp) Nei, eg skal síggja Barnaløtuna.

Jákup: Barnaskvaldur.

Elin: Nei, eg má síggja hana. Tú kanst fara til Tom. (Tey berjast) Rom ringdi. Tú skalt ringja til hansara.

Brynhild: (Kemur inn og granning Heri aftaná.) Símun, Heri er her.

Heri: Situr tú her og svevur?

Símun: Nei, eg havi beint nú sett meg.

Heri: Tú, kom niðan til mín og hygg eftir fótbóltskampinum millum (frítt valg, hvør skal spæla) Tað sæst so væl hjá mær.

Símun: Eg havi ikki tíð. Eg veit ikki. Ætlaði at síggja okkurt í Dag og viku.

Heri: Tvætla ikki býtt. Brynhild tekur tað upp fyri teg.

Símun: Ja kanska. Taðn er so hugnaligt at sita saman og hyggja eftir fótbóltskampi. (Teir fara. Telefonin ringir aftur. Jákup og Elin støðga á. Hyggja hvør at øðrum).

Elin: Tak hana, hatta er Tom.

Jákup: Alt í lagi so, men tú ert tóm. Emty bottle. (Tekur telefonina) Hvat sigur tú, nei halt gák. Nei, nei. Jú, jú. Tendra ikki videoið fyrr enn eg komi. Eg komi við tað sama. Sum eitt snarljós.

Elin: Gud havi lov. Nú kann eg sita í frið og náðum. Sær omma?

Marin: Jú, jú, eg síggi tað eg vil síggja og hoyri, tað eg vil hoyra.

| | |
|---|---|
| Brynhild: | Elin, Lív, syskinabarnið hjá tær, er her. Tú hevur gloymt, at tú skalt til fimleik. Skunda tær. |
| Elin: | Oy jedurnar. Tað havi eg púra gloymt.<br>Eg havi ikki tíð, næstan. |
| Brynhild: | Tá ið tú hevur meldað teg til, og vit hava goldið, skalt tú eisini fara, og tú skalt venja teg til at møta stundisliga. (Hon fer) (Lív er komin inn) |
| Lív: | Halló omma. |
| Marin: | (hvøkkur við) Nei vælsignað er tað tú. Kom og gev ommu ein muss. (Tær mussast) (Omman tekur um hendurnar á henni) Ert tú ikki køld góðasta. |
| Lív: | Nei, nei omma. |
| Marin: | Og hvat er tað, tú gongur í stakkal.<br>Hvussu er tað tú sært út. |
| Lív: | Eg eri smørt omma. Halda tygum ikki tað.. |
| Elin: | Kom nú, (rópar Elin) Alt í lagi omma. Hav tað gott. |
| Marin: | Ja, ja men forkøla teg ikki. Elin sløkk sjónvarpið. (Elin kemur inn aftur). |
| Elin: | Tað kann bara vera frá. Tú kanst hyggja at tí. |
| Marin: | Eg man hava sæð nóg mikið í mínari tíð og sæð tað eg skal. (Elin fer. Marin er aftur einsamøll). |
| Marin: | Á, á tann lætti. Tann vælsignaði friður (leggur stokkarnar í fangið).<br>Nú hoyri eg tónleik. Himneskan tónleik.<br>(Vit hoyra jólatónleik) |